

HBa piltar. FM vinnarar 2003. Standandi frá vinstru: Hjalti Mohr Jacobsen, venjari, Gunnar Thomsen, Andrias Sólsker, Fríði Lamhauge, Esmar Poulsen, Óla Jákup Dahl, Hálvdan B. Dalsgaard, Jógvan Breckmann, Tórur Restorff. Húkandi frá vinstru: Kristoffur Kristoffersen, Óli Arge, Christoffur G. Nielsen, Kristin R. Mouritsen, Thomas Juul Thomsen, Jógvan Rói Davidsen og Tóki Ellefsen

*Framhald av síðu 21*

dystir á 1. liðnum, sum vann FM heitið.

Tað hevur verið kappast í unglingadeildini síðani 1967. HB vann fyrstu kappingina, og higartil hava teir vunnið seytjan av teimum 37 kappingunum ella knappliga annað hvørt FM heiti.

## Yngru deildirnar

Piltarnir hjá HB vunnu FM heitið sannførandi. HB tykist so at siga at eiga patent upp á meistaraskapin hjá teimum 10–12 ára gomlu. FM heitið hesa ferð er tað fjórða upp í slag, og seinastu níggju árini hevur HB verið meistari hvørja ferð, tá ið sæð verður burtur frá 1999, tá ið B36 var meistari.

Á yvirlitinum í FSF skipanini sæst, at tað hevur verið kappast í piltadeildini síðani í 1967. Men tað hevur ikki altíð verið sami aldursbólkur, sum hevur kappast í hesi deildini. Frá 1967 og fram til og við í 1975 kappaðust allir dreingir, sum vóru yngri enn fjúrtan ár, í piltadeildini. Í 1976 sá smádreingjadeildin dagsins ljós. Hon var og er ætlað dreingjum, sum eru 12–14 ára gamlir. Síðani tá hevur piltadeildin verið fyri teir 10–12 ára gomlu.

Smápiltarnir, sum eru teir, ið eru upp til tíggju ára gamlir, hava kappast um FM síðani í 1982. Einasta árið, har eingin vann FM – hvørki í piltadeildini ella í smápiltadeildini – var í 1988. Tá varð hildið, at tað var ikki rætt, at so ungir dreingir skuldu kappast um FM heitið. Hetta varð kortini broytt longu árið eftir. HB hevur ikki vunnið so nógv FM heiti í smápiltadeildini, sum teir hava vunnið í hinum dreingjadeildunum, men teir eru kortini tað felagið, sum hevur vunnið FM oftast. HB vann fyrstu kappingina, sum var í 1982, og nú hava teir vunnið fyriáttandu ferð. Tey bæði undanfarnu árini hava B36 og TB vunnið smápiltadeildina. 2003 var tjúgunda árið, at tað varð kappast um FM í smápiltadeildini.



HB unglingar. FM vinnarar 2003. Standandi frá.: Oddbjørn Joensen, hjálparvenjari, Rókur av Fløtum Jespersen, Páll Mohr Joensen, Rasmus Nolsøe, Eli Thorsteinsson, Jón Clementsen, Christian Eli Zachariassen, Bjarni Jørgensen, Frank Skytte, venjari, Sólbjorn Thomsen, liðleiðari, Bent Tommy Linklett, hjálparvenjari. Húkandi frá vinstru: Julian Frandsen, Bárður Klein Mittelstein, Rani Debes Christiansen, Pól Andreassen, Emil Nolsøe Leifsson, Thomas Hans Rubeksen og Svenn Fuglø Jacobsen. Á myndini væntar Pól Næss Joensen

## Á veg úr skugganum

Fleiri tey seinastu árini hevur KÍ verið einaráðandi í kvinnudeildini. KÍ vann FM og steypakappingina aftur í ár, og tað er nógv, sum bendir á, at KÍ aftur næsta ár, fer at vera heilt væl fyri í kvinnukappingini.

HB var í steypafinaluni ímóti KÍ, og HB fekk bronsu í FM kappingini. Síðsta FM heitið í kvinnudeildini vann HB í 1999, og í 2001 vunnu tær steypakappingina.

Um úrslitið í gentudeildini, sum er fyri tær 14–17 ára gomlu verður nýtt sum grundarlag at meta um framtíðar vánirnar í kvinnukappingini, so er tað ikki óhugsandi, at HB aftur fer at gera seg galdandi. HB genturnar vunnu 30. august endaumfarið í steypakappingini. Tær kappaðust henda dagin við B68, sum gjørdist nummar tvey, og EB/Streym. HB plagar at vinna nógvar steypakappingar, men í ár hevur felagið bara vunnið hesa einu steypakappingina.

Í síðstu viku varð greitt, at HB hevur vunnið FM heitið í gentudeildini. Tær fingu 49 stig og vóru nógv fremstar. ÍF var næstbest við 31 stigum.

Tað hevur verið kappast í gentudeildini síðani í 1985. Av teimum nítjan kappingunum hevur KÍ vunnið fimm, HB hevur í ár vunnið sína fjórðu FM kapping, ið er sama talið, sum B36 hevur vunnið. B36 var meistari í fjør, og FM heitið hjá HB í ár er tað fyrsta hjá teimum síðani 1998. KÍ hevur ikki verið meistari í hesi deildini síðani í 1997. Tá vóru tað fleiri av teimum, sum síðani hava vunnið so nógv í bestu kvinnudeildini, ið vunnu FM heitið til Klaksvíkar.

Sosialurin ynskir HB tillukku við øllum gullinum og skreytinum.


**AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN ER NAKAÐ TAÐ SAMA**

Tit vilja hava fatur á tí besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning. Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum“?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði.
Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum.
Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi, so eru vit altíð til dystin fús

HESTPRENT
Dvørgastígur 7
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
Tel: 314555 • Fax: 318 026
t-post: hestoy@hestprent.fo






Nógv varð lagt fyri, nú fyrsta kappingin í nýggja svimjiárinum varð hildin í Klaksvík um vikuskiftið

# Langteinakapping í Klaksvík

**Bólkarnir 4-5 og eldri kappaðust um vikuskiftið á longu teinunum í Klaksvík**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Langteinakapping í Klaksvík hevur verið um vikuskiftið. Hetta var kapping fyri bólkarnar 4-5 og eldri, tvs svimjarar frá 13 ár og uppeftir.

Hetta var kapping har dentur var lagdur á longri teinarnar, tvs 200, 400,800, 1500m svimjing.

Hetta var fyrsta svimjikapping í hesum svimjiárinum árinum hvar svimjararnir eru fluttir í eldri bólk, og gekk hon væl.

Næsta kapping verður í Fuglafirði um 14 dagar, og verða tað tá tey yngru ið fara at royna seg, tvs. bólkur 1-2-3 tað eru svimjarar frá 12ár og yngri.

Samlaða býtið av heiðursmerkjum gjørdist soleiðis:

| | G | S | Br |
|---|---|---|---|
| Havnar Svimjifelag | 27 | 22 | 10 |
| Tvøroyrar Svimjifelag | 7 | 6 | 3 |
| Fuglafjarðar Svimjifelag | 6 | 5 | 13 |
| Skeggjar úr Gøtu | 3 | 1 | 6 |
| Ægir úr Klaksvík | 1 | 1 | 1 |

Fremstu svimjararnir í einstøku bólkunum vóru hesi. (bólkur 4 er árg 89-90, bólkur 5 er árg 87-88, eldri bólkur er árg 86 og seinni)

**Kapping 1.**
**400m.frí kvinnur, árg 86 og eldri**

| Nr | Navn | Felag | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1 | Henny Abrahamsen | FS | 5,57,1 |

**árg 87-88**
1 Lisbeth L. Joensen HS 4,56,5
2 Sára Ejdesgaard TS 5,11,5

**Kapping 2**
**400frí menn, árg 86 og eldri**
1 Andrass Thomsen HS 4,15,4
2 Janus Olsen HS 4,32,5
3 Sonni Eliasen FS 4,50,6

**árg 87-88**
1 Egil Gunnarsson HS 4,52,2
2 Bogi Jørgensen HS 5,08,4
3 Haraldur Eið Skeggjar 5,12,7

**árg 89-90**
1 Kári j Á HøvdanumSkeggjar 5,23,3
2 Svein Magnason FS 5,59,9

**Kapping 3**
**200m bringa kvinnur, árg86 og eldri**
1 Jonny Hansen FS 3,17,4

**árg 87-88**
1 Karin K Eysturberg TS 3,14,6

**árg 89-90**
1 Maria Vang TS 3,16,9
2 Randi Gunnarsdóttir HS 3,25,1
3 Kirstin RasmussenSkeggjar 3,40,4

**Kapping 4**
**200m bringa menn, árg 87-88**
1 Haraldur Eið Skeggjar 3,21,9
2 Egil Hvannastein HS 3,23,5

**árg 89-90**
1 Rúni Klein Hansen HS 3,01,0
2 David Simonsen FS 3,29,9
3 Walter Nysted Ægir 4,21,7

**Kapping 5**
**200m blanda kvinnur, árg 89-90**
1 Paula Rasmussen HS 2,52,9
2 Hildibjørg Joensen TS 2,57,9
3 Anita Højgaard FS 3,21,6

**Kapping 6**
**200m blanda menn, árg 86 og eldri**
1 Jóannes á Fløtti HS 2,28,4
2 Janus Olsen HS 2,28,8
3 Sonni Eliasen FS 2,43,1

**árg 87-88**
1 Aksal Norðfoss HS 2,29,7
2 Egil Gunnarsson HS 2,36,6

**Kapping 7**
**200 rygg kvinnur, árg 86 og eldri**
1 Karina Petersen FS 2,44,8
2 Rannvá Jacobsen HS 2,49,7
3 Halla W. Reinert HS 3,00,5

**árg 87-88**
1 Sára Ejdesgaard TS 2,39,0
2 Lisbeth L. Joensen HS 2,40,5
3 Elida Bjarnadóttir HS 2,48,1

**árg 89-90**
1 Helga Djurhuus HS 2,50,6
2 Rúna Joensen Ægir 2,58,2
3 Jutta Thomsen TS 3,05,5

**Kapping 8**
**200 rygg menn, árg 86 og eldri**
1 Dia Jacobsen HS 2,19,1
2 Andrass Thomsen HS 2,24,2
3 Janus Olsen HS 2,25,1

**árg 87-88**
1 Aksal Norðfoss HS 2,42,7
2 Búi Rouch HS 2,50,3
3 Tróndur Olsson HS 3,07,0

**árg 89-90**
1 Rúni Klein Hansen HS 2,40,1
2 Kári á Høvdanum Skeggjar 2,44,5
3 Sveinur Magnason FS 3,09,5

**Kapping 9**
**Liðkapping 8x50m frí mix kvinnur og menn**
1 HS 3,57,5
2 HS 4,04,1
3 FS 4,10,3

**Kapping 10**
**800m frí kvinnur, árg 86 og eldri**
1 Jonny Hansen FS 12,38,8

**árg 87-88**
1 Lisbeth L Joensen HS 10,17,4

**árg 89-90**
1 Jutta Thomsen TS 10,37,1
2 Anna K Eysturberg TS 11,28,0
3 Heidi Strømsten Skeggjar 12,10,4

**Kapping 11**
**1500m frí menn, árg 86 og eldri**
1 Andrass Thomsen HS 17,27,4
2 Sonni Eliassen FS 19,46,1